# At skriva er mín

Myndir: Jens Kristian Vang

**– Tað kennist so deiligt innaní, tá eg skrivi, at eg bara vil hava meir, sigur rithøvundurin Sólrún Michelsen, sum samanber sína skriving við eitt rúsevni, hon er vorðin bundin av**



*– Tað ber ikki til at planleggja seg fram til eina góða søgu. Søgan skal vilja fram sjálv, sigur rithøvundurin Sólrún Michelsen, sum herfyri fekk M.A. Jacobsens virðislønina fyri fagrar bókmentir*

## Portrett



Anna V. Ellingsgaard
anna@sosialurin.fo

Tað var við piprandi hjarta, tá Sólrún Michelsen fyri nøkrum árum síðani fyrstu ferð skuldi skriva "rithøvundur" aftanfyri sítt navn. Í hennara verð vóru rithøvundar onki minni enn gudar, og hon helt tað snøgt sagt vera flovisligt at billa sær inn, at hon kundi blanda seg í eitt slíkt selskap.

Síðani tá hevur Sólrún Michelsen ikki bara vant seg við fína yrkisheitið. Herfyri kundi hon hartil skriva M.A. Jacobsen virðisløn afturat rithøvundaheitinum, tá hon fekk virðislønina fyri fagrar bókmentir fyri bókina *Tema við slankum.*

Men gudakendu rithøvundarnir – teir hoyra framvegis heima á bókahillini hjá Sólrún Michelsen.

– Eg havi altíð ivast í, um nakar dugur er í tí, eg skrivi. Í so máta hevur M.A. Jacobsen virðislønin givið mær frið í sálina til at halda fram, sigur hon, men undrast kortini framvegis yvir, at tað júst gjørdist *Tema við slankum,* sum varð heiðrað við virðislønini.

– Satt at siga helt eg, at handan bókin langt síðani var gloymd. Lítið og onki bleiv gjørt burtúr henni, tá hon kom út fyri einum ári síðani, og eg helt nokk, at tað mundi vera, tí fólk ikki hildu hana hava so nógv uppá seg.

## Lygnir og veruleiki

Tað er annars ikki so lætt at gloyma navnleysu "gentuna" í *Tema við slankum,* sum foreldrini hava stikað inni í einum úthúsi, har hon gongur og fyllir lógvarnar við feitum, svørtum og surrandi skinnflugum. Inni í úthúsinum er gentan ónda drotningin, sum hini børnini bæði ræðast og kenna seg drigin at. Men tá foreldrini umsíðir mugu sleppa gentuni út, tí hon er komin til skúlaaldur, fær ræðslan tak á henni. Hon torir ikki út um portrið og: "Long tíð gekk, áðrenn tey fingu bankað bangilsi so mikið úr henni, at hon tordi at ganga tann stutta teinin til skúlan", sum frásøgurøddin staðfestir, meðan óunniligi setningurin verður hangandi í luftini.

Søgan um gentuna er bert eitt av mongun smáum brotum í eini frásøgn sum vísir, hvørjar avleiðingar ymisk kor í uppvøkstrinum kunnu hava á vaksna lívið. Og Sólrún Michelsen dylur ikki yvir, at søgurnar taka støði í hennara egna barndómi í fimtiárunum. Men harvið heldur so eisini alt samband millum bókina og veruleikan uppat.

***Eg vil sleppa at tyggja søguna sjálv, fáa bein í hálsin, spíta steinar út og hava kjøt sitandi eftir millum tennirnar***

– Tað er rætt, at ávís eyðkenni við ymsum persónum frá mínum barndómi hava sett ferð á søgurnar, men restin er frítt hugflog. Og tað er heldur ikki vist, at hendingarnar fóru fram júst soleiðis. Fólk minnast so ymiskt, alt eftir, hvørjum stemningi, vit vóru í, júst tá okkurt hendi, sigur Sólrún Michelsen, sum tí eisini er eitt sindur kløkk av, at so nógv hava lisið bókina sum eitt slag av sjálvsævisøgu hjá høvundanum.

– Eg øtist serliga, tá onkur sigur seg minnast onkra hending í bókini, sum eg veit, er berur heilaspuni. Tað er jú rættiliga ræðandi, at fólk soleiðis gera mínar lygnir til sín egna sannleika, so eg má heldur ansa mær, hvat eg skrivi, sigur høvundurin.

## Vil tyggja sjálv

Tað fer hon tó neyvan, tí Sólrún Michelsen er ikki sinnað at lata hurðar aftur beint í nøsina á skaldskapinum.

– Eg haldi tað vera stórt spell, tá fólk lata sína lesing avmarka við allatíðina at vilja hava svar uppá, um okkurt er satt ella ikki. Alt tað fantastiska við skaldskapi